DAGSINS MEINING

Samgonguskrædl!

Ein óvanlig støða hevur tikið seg upp í samgonguni. Ein tingmaður Tjóðveldisfloksins hevur samb. royndan advokat ærumeitt løgmann. Óvist er, um tað er gjørt í øðisherindum, ella um miðvís ætlan liggur aftanfyri. Formaður floksins er komin við ørkymlandi útmeldingum. Eftir fyrra álopið hjá Tórbirni Jacobsen á Fólkaflokkin sigur Høgni Hoydal seg kunna taka undir við tí. Eftir seinna álopið sigur hann, at hetta nú er eitt persónligt mál millum løgmann og Tórbjørn. Í fyrstu atløgu snúgva álopini seg um vinnupolitikkin, ið ósemja er um. Men kann talan eisini vera um ónøgd inannhýsis í Tjóðveldisflokkinum? Tórbjørn og Heine hava verið ónøgdir við, at flokkurin lat Fólkaflokkinum vinnumálini, nú hann fekk løgmann. Aftrat tí er eysturoyartingmaðurin ónøgdur við, at hansara valdømi onki landsstýrisumboð fekk. Tað kann vera orsøkin til, at hann hevur tikið sekslløbaran fram og skjýtur til vinstru og høgru og eisini rakar løgmann - men harvið eisini óbeinleiðis sín egna formann! Skuldsetingin móti løgmanni er nevniliga so mikið álvarslig, at heldur ikki Tjóðveldisflokkurin kann liva við henni, skal hann halda fram at samstarva við løgmann. Tí er hon ein boomerangur, ein fulltreffari í egið mál. Løgmaður kann ikki hava Tobba sum part av meirilutanum eftir slíka skuldseting. Ger hann tað missir hann alt trúvirði og alla virðing millum manna. Hoydal má gera støðuna upp. Má velja síðu – løgmann ella Tobba.

Ella kann talan vera um eina ráðagerð móti løgmanni, ið leiðslan í E hevur verið vitandi um? Tí tjóðveldismenn hava neyvan gloymt, at tað var løgmaður, ið steðgaði vælsmurdu og skjóttkoyrandi loysingarmaskinuni. Men samtíðis hevur flokkurin alt at takka sama løgmanni, aftur fyri ta vald flokkurin hevur fingið. Kann tað hugsast, at Tobbi/flokkurin ikki hevur gloymt, at løgmaður koyrdi grús í fullveldismaskinarið og nú vil "hevna" seg við at krevja, at vinnupolitikkurin verður eftir tjóðveldisresept? Gátan er tó, hví so grovar skuldsetingar verða settar móti tí løgmanni, ið jú hevur tryggjað E so stóra makt og hví júst nú!

Løgmaður kann ikki liva við skuldsetingunum. Tað er ikki nokk, um formaður E vísir teimum frá sær. Fyri at bliva reinsaður má løgmaður krevja av Tobba, at hann etur orðini í seg aftur. So er spurningurin, um samgongan stendur uppá spæl. Higartil hevur formaðurin í E klárað at bjargað flokkinum burtur úr mongum sjálvgjørdum ólukkum, kanska hann aftur hesaferð hevur ein trumf í ermuni, soleiðis at hann kann varðveita maktina: at koyra Tórbjørn í farloyvi og taka næstvalda inn. Tá er hann "bara" fólkatingsmaður. Eftir stendur tó skuldsetingin móti løgmanni og spurningurin: var hetta ein einmansgerð ella visti flokkurin um hana og góðtók hann skuldsetingina? Løgmaður kann einsamallur gera av, hvørja avleiðing hetta skal fáa. Fer hann at vera passivur eygleiðari ella seta hart móti hørðum og harvið seta samgonguna uppá spæl? Fer hann at lata sær lynda, at Tobbi bara verður koyrdur út á eitt "síðuspor" enn einaferð? Høgni Hoydal hevur fingið sítt størsta høvuðbrýggj nakrantíð. Ger løgmaður einki við málið, fer illgrunin,ið er sáddur, at hanga við honum restina av hansara lívi.

Sosialurin

Anker 80 ár

Í dag fyllur Anker Jørgensen, fyrrv. forsætismálaráðharri 80 ár. Øll árini hevur Anker Jørgensen verið sera virkin, tey mongu árini sum fakfelagsmaður og formaður í størsta fakfelagnum í Danmark, SID, til hann í 1972 fyrstu ferð var kosin forsætismálaráðharri. Hann var tilsamans í hesum sessi í 9 ár og var somuleiðis fólkatingsmaður tey mongu árini, til hann gavst fyri aldur.

Fáur man hava verið ídnari eisini sum rithøvundi sum hann. Ikki er heldur at gloyma hansara sera væl umtókta virksemi sum fyrilestrarhaldari og tað er á mongum økjum hann fevnir. Enn er hann virkin og hevur fleiri fyrilestrar hvørja viku um alt landið.

Anker Jørgensen vitjaði í Føroyum í mai í ár og var m.a. til 75 ára haldið hjá Sosialinum. Hann var á almennum fundum í Norðurlandahúsinum og aðrastaðni við. Í gjár var stór móttøka í Rømersgade í Keypmannahavn fyri honum í Arbejdermuseet.

VIÐMERKINGAR

Varaløgmaður vil stýra fjølmiðlunum

Vanligt er í demokratiskum londum, at fjølmiðlarnir eru vakthundurin, fjórða statsmaktin, sum skal ansa eftir, at teir fólkavaldu ikki hóreiggja sær sum teimum lystir. Soleiðis er ikki á Fregnum, har loypir alt líkasum saman í eitt, fjølmiðilin, sum skal ansa eftir tí lóggevandi og útinnandi valdinum og teir fólkavaldu sjálvir, sum eru ein síða av somu søk, skulu vit trúgva oddagreinini. Í seinastu útgávuni av blaðnum skrivar varaløgmaður Høgni Hoydal sjálva oddagreinina, og so kunnu vit vera vís í at hon ikki er kritisk móti hansara egna politikki ella flokksfeløgum.

Oddagreinin hevur at Sosialinum, tí vit halda tað hevur týðning at fortelja lesarunum, at kendi danin Mogens Glistrup vitjar í Føroyum. Vit verða lagdir undir at birta upp undir fremmandaótta við at skriva um Mogens Glistrup. Út frá hesum kann eg ikki lesa tað ørvísi, enn at varaløgmaður heldur at føroyingurin er viðkvæmur og tað er ikki alt, sum hann hevur gott av at hoyra. Politikkarar og journalistar kunnu so í samráð avgera hvat er gott og hvat er ringt fyri lesaran.

Sosialurin og undirritaði verða lagdir undir ókritiskt mikrofonhaldarí, tí vit nevna óttan hjá Glistrup fyri framtíðini. Gott nokk standa spurningarnir ikki í greinini, men Glistrup svarar upp á spurningarnar vit settu, og hann fegnast um politikkin hjá sitandi stjórn í Danmark, sum tekur undir við politikkinum, Glistrup stóð á odda fyri.

Eigur føroyingurin ikki at fáa at vita hesi sjónarmið, ella skuldi Sosialurin latið vera við at skrivað hesi, tí okkara lesarar kanska ikki tola slíkt. Skulu vit bert velja at tosa við fólk, sum ongan skaða gera, og skulu vit ikki verja rættin hjá øllum at sleppa fram at í einum demokratiskum samfelag.

Mín fatan er, at varaløgmaður so hjartaliga fegin eisini kundi hugsað sær at stýrt hinum fjølmiðlunum í Føroyum og ikki bara Fregnum.

Og hetta er ikki ein pástandur, sum er tikin út úr leysari luft. Høgni Hoydal hevur ferð eftir ferð roynt at lagt seg út í mítt arbeiði sum tíðindaleiðari á Sosialinum. Tað er meira enn einaferð hent, at hann hevur roynt at yvirtala meg til at taka forsíður aftur, tí Tórbjørn Jacobsen nú einaferð hevur havt eitt tamarhaldsleyst og óberokniligt anfall, og flokkurin er komin illa fyri. Hann hevur hótt við at steðga útgávunu, hvussu hann annars hevur hugsað sær at gjørt tað. Sum fólkavaldur heldur Høgni Hoydal seg hava rætt til at forpurra okkara skriviframlsi undir ábyrgd.

Og feskasta dømi um hvussu Høgni Hoydal roynir at stýra fjølmiðlunum er seinasta vikan. Avloysarin hjá honum á fólkatingi, Tórbjørn Jacobsen, leggur løgmann og fiskimálaráðharran undir ikki at kenna munin á sínum egna og annara. Í fleiri dagar grevur hann seg niður og harvið heldur hann føroyingin sum gísla, samstundis leggur hann fót fyri arbeiði hjá journalistunum á øllum fjølmiðlum í Føroyum at útgreina hesa, um hon er sonn, horriblu skuldseting. Høgni Hoydal gevur øllum Føroya fólki ta fatan, at hann hevur okkurt at fjala, við at goyma seg fyri fjølmiðlunum í hesum máli og við at tiga stýrir hann eisini journalistiska deknginum av hesum týdningarmikla máli. Við at tiga vónar hann, at vit gloyma og at upptakið eftir Tórbjørn gerst eitt sindur lættari hesuferð.

Duga løgmaður Anfinn Kallsberg og fiskimálaráðharrin Jørgin Niclasen ikki at síggja mun á sínum egna og annra? Tórbjørn Jacobsen og Høgni Hoydal hava enn ikki hjálpt okkum til at svara spurningin, hóast Høgni í skrivandi stund tykist at vera royktur út úr holuni.

Kemur Jorg Heider. Le Pen og Pia Kjærsgaard á vitjan, so sleppur lesarin eisini at lesa um tey og um hvat tey hava upp á hjarta í Sosialinum, uttanmun til hvat varaløgmaður sigur í oddagrei í sínum miðli Fregnum.

Ongin politikkari, hvør enn hann er í Føroyum, skal gera sær vónir um at stýra tíðindaflutninginum á Sosialinum.

Justinus Leivsson Eidesgaard
tíðindaleiðari á Sosialinum

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Fíggjarleiðari:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard
justinus@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Rúnar Reistrup runar@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliassen solby@sosialurin.fo
Ragnhild Ellingsgaard
ragnhild@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Páll H. Johannesen pall@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Finnur Justinussen finnur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo
Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507 tel. 333843
Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað
mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framihjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Samgongunnar dance macabre

Tobbi eigur apuna

Bergur P. Dam

Tórbjørn Jacobsen má taka ullina úr munninum og fortelja okkum, hvørji brotsverk hansara landsstýrismenn hava framt. Og greiða frá, hví hann vil halda fram í samgongu við slík bølmenni.

Ikki í hvørjum tíggjuári verða so álvarsligar skuldsetingar havdar á lofti, sum tær ið fólkatings- og løgtingsumboð Tjóðveldisfloksins nú setur fram ímóti sínum egnu landsstýrismonnum. Minni enn 3 mánaðir eftir at Tórbjørn Jacobsen tryggjaði Anfinni Kallsberg løgmanssessin og Jørgeni Niclasen landsstýrissessin, skýrir hann teir nú at verða so stórar tjóvar, at teir ikki í nøkrum landi høvdu kunnað sitið í stjórn. Formaður Tjóðveldisfloksins hevur alment boðað frá, at hann fult út stuðlar skuldsetaranum.

Hetta eru ótrúligar og skelkandi skuldsetingar. Og tað mest skelkandi er, at hóast Tórbjørn og formaður hansara eru sannførdir um, at teir eru í samgongu við brotsmenn, so ætla teir framvegis at stuðla hesum, sum teir skýra brotsmenn. Tí er tað so, at Tórbjørn Jacobsen veit at hann hevur rætt, men onki ger við tað, ja, so er hann samsekur.

Ullartos

Men hóast skuldsetingarnar eru í serflokki grovar, so hevur Tórbjørn samstundis munnin - ella kanska pennin - fullan av ull. Tann, sum lesur greinina hjá Tórbirni, fær at vita, at hansara landsstýrismenn - Annfinn og Jørgen - eru so kriminellir, at teir ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi. Tað skilst at teir hava framt álvarsligan stuldur. Men hvat tað er teir hava stolið, fortelur hann ikki. Hvørji tey ítøkiligu brotsverkini eru, vil hann ikki út við. Og tað er kanska tað mest perfida. Nú er frítt slag fyri einhvørji illgiting, samstundis sum ivin um trúvirði skuldsetarans eisini tekur seg upp.

Demokrati trupulleiki

Hóast hann ikki hevur tikið stuðul sín til Tórbjørn aftur, so roynir tjóðveldisformaðurin - sær sjálvum líkt - at tveita "flimmur" út. Hann roynir at billa okkum inn, at hetta bert er eitt klandur ímillum løgmann og Tórbjørn. At báðir eru líka góðir um tað. Hóast vanliga fatanin annars er, at her er talan um einsíðugt álop frá Tórbirni.

Men tað gongur ikki. Tí hevur Tórbjørn rætt og løgmaður og fiskimálaráðharrin eru so kriminellir, at teir ikki kundu sitið í stjórn í nøkrum øðrum landi, so er tað ikki bara samgongan, ið hevur ein trupulleika. Nei, so er tað demokratiið í Føroyum, sum hevur ein trupulleika. Tí so hava vit júst fingið eina samgongu - Fólkaflokkur, Tjóðveldisflokkur, Sjálvstýrisflokkur og Miðflokkur - sum er grundað á brotsverk. Og sigur Tórbjørn - við stuðli frá Tjóðveldisflokkinum - ósatt, so hava bæði hann og hansara flokkur diskvalifiserað seg so tað stendur eftir. Tí ógrundað at seta fram so grovar skuldsetingar, tað má skrykkja burtur tað síðsta trúvirði hjá hesum flokki.

Apuna úr skápinum

Mong spyrja, hvat ítøkiligt er aftanfyri hesar ullintu ærumeiðingar. Tórbjørn situr við apuni og nú spyrja vit, um Tórbjørn lýgur, ella hann stuðlar eini ránsmannasamgongu. Hesum spurningi bíða vit eftir at fáa svar uppá.

Bent Rubeksen til minnis

Bent Rubeksen, hesin sjáldsami og vinsæli maður er farin. Burt er stríð og strev og eftir er ævig hvíla, har ongin kennur sjúku og stríð.

Tá eg fekk boðini um at Bent ikki var ímillum okkum longur, kom mær til hugs henda glaða, vinsæla og sjáldasama mannin. Nú hevði hann fingið hvílu, hann sum var illa plágaður av sjúku, men hóast tað stríddist fyri at koma ígjøgnum hvønn einasta dag. Altíð við vinsælum sinnalagi.

Liðagikt er ein sera pínandi og troyttandi sjúka, ein sjúka sum kann niðurbróta kropp og sinn.

Fá eru tey, sum kunnu bera hesa sjúku so væl, sum hesin sjáldsami maður sum Bent var.

Ikki gjørdi hann nógv burturúr sær sjálvum men bar hesa sjúku við slíkari styrki, sum vit onnur við virðing minnast hann fyri.

Hóast kroppurin var merktur av hesu sjúku var sinni frítt og lætt. Hann hevði tað styrki at læta sinni vinna á kroppi og sjúku. Ein styrki sum fáum er ognað.

Eg hevði tað gleði at sita í nevndini í Giktafelagnum saman við Bent í fleiri ár.

Tað var altíð ein góður samstarvsandi millum okkum øll, sum sótu í nevndini, og var Bent ein stór orsøk til hettar, altíð glaður, altíð eitt stuttligt prát har gleði var í hásæti, var góður at samstarva við og altíð fúsur at hyggja frameftir, eftir góðum loysnum sum kundi verða til gagn fyri tey sum eru giktsjúk í Føroyum .

Ongin visti betur enn hann hvar skógvurin trýsti, tí hann var illa plágaður av liðagikt. Hann visti eisini at vit í felagnum mátti sjálvi gera eitt arbeiði um vit skuldi fáa hjálp, og at sjúklingar kunnu ofta gjøgnum eitt virkið felag hjálpa hvørjum øðrum.

Tíðin vit sótu í nevnd saman var ein tíð tá felagið fór ígjøgnum stórar broytingar, og Bent tók altíð undir við teimum nýggju hugskotunum sum kundi gera felagið meiri virkið og meiri nútíðarhóskandi.

Góða Jona, vit minnast okkara góða samstarvsfelaga við virðing, og ynskja at Harrin má styrkja teg og tykkum øll í sorgini.

Ærað verður minnið um Bent Rubeksen.

Giktafelag Føroya
Leila Solmunde, formaður

Sluppu ikki við Smyrli

Ása Johannesen
(ónøgdur Jóansøkugestur)

Eg var á Jóansøku í ár, og tað vóru nógvar aðrar nýflogdar pisur eisini. Hetta var sera hugnaligt, og tað var stuttligt at síggja allar húgvurnar til kappróðurin og so eisini seinni til dansin. Sum vera man vóru tey flestu ungu fólkini har umleiðir toluliga ávirkaði av rúsandi løgi, og kanska av tí sama var lagi ógvuliga gott, men hetta fekk ein bráðan enda.

Nógv av okkum høvdu gjørt av at vera verandi í Vági til dansurin var av, og síðani fara við Smyrli norður aftur sunnumorgun. Tað, at summi høvdu fyri neyðini at vera í Havn sunnudagin, forðaði teimum ikki í at bíða til sunnumorgun at fara norður, tí tað var jú ikki stórur vandi fyri at Smyril var fullur hendan morgunin, eftirsum at tað mesta róðrarfólkið longu var farið norður. Og rætt var. Sunnumorgun klokkan sjey vóru bert 179 fólk umborð á Smyrli, men hóast hetta stóðu yvir 50 fólk í Vági sum kánus, og sluppu ikki við Smyrli. Orsøkin til hetta var, at bussurin (og tað var bara ein) ikki fekk tikið øll ferðafólkini úr Vági við sær til Drelnes. Vit mistu tó ikki mótið beinanvegin. Vit ringdu higar og hagar, at spyrja um trupulleikin ikki kundi loysast, men tá allir møguleikarnir vóru uppi, uttan at støðan var broytt, gjørdu vit at at ringja til Reidar Nónfjall, at biðja um hjálp. Tað var til fánýtis, tí hann noktaði at hjálpa okkum á nakran hátt, hóast vit høvdu nógv hugskot. Orsøkin til manglandi hjálpina var ivaleyst, at vit høvdu vakt R.N. og so tað, at einastu møguleikarnir at fáa okkum umborð, høvdu seinkað Smyril (uml. 1/2 tíma), og tað ber eftir øllum at døma ikki til. Samtalan við R.N. endaði við, at vit blivu skuldsett fyri ikki at hava hugsað nóg langt, og at tað var okkara fávitska og gáloysni sum gjørdi, at vit ikki sluppu við Smyrli. Tað høvdu vit ikki hug at hoyra uppá, sum vónbrotin, móð og svong ferðafólk, so vit søgdu farvæl. Tá vit aftur royndu Smyril, bleiv horni bara lagt á, meðan vit kærdu okkara neyð.

Vónbrotin og illa fyri royndu vit nú at finna hús, soleiðis at vit høvdu eitt stað at sova, vit vóru jú ikki júst komin upp, men ætlaðu okkum í song, tá vit komu heim. Vit skuldu eisini bíða til Smyril sigldi aftur 10 tímar seinni, og tað er ikki nógv at taka sær til sunnudag, í eini bygd sum Vágur (ikki tí, hon er ógvuliga framkomin í mun til Strandferðsluna í okkara lítlu komandi banan republikk). Ikki vóru tað øll sum kendu onkran í Vági, men tíbetur eru fólk har, sum loyva strandaðum ferðafólki, at sova í síni stovu. Vit skuldu eisini hava fatur á fólki, sum gekk og bíðaði eftir okkum í havn, og ikki hava øll verið glað, tá summi til dømis ikki kundu koma til arbeiðis tann dagin.

Hetta er sjálvandi nakað, sum kann henda, og ongin er lýtaleysur, men av tí at eg veit, tað er hent fyrr, havi eg ógvuliga ilt við at umbera hetta uttan at koma við eini umbøn fyrst. Eg haldi at Strandferðslan skal gera stórar broytingar í sína ferðaætlan. Fyrst skuldi tað staðið við stórum bókstavum, at fólk sum fara á Jóansøku, skulu ikki vænta sær at sleppa norður aftur við hjálp frá Strandferðsluni. Eg havi leitað og grivið, men tað stendur ikki so frægt sum við smáum. Harafturat skal R. N. umhugsa sína heilsan í áðurnevndu ferðaætlan, tí fari eg ikki skeiv, so nevnir hann tænastu, men eg finni ikki nakað sum líkist tænastu hendan morgunin. Tað tøktiskt, sum um vit vóru óynskt, og ein trupulleiki, sum eingin hevði hug at loysa. Men hetta var kanska, tí vit bert vóru fullir studentar?

Kommunur á fundi

Kommunusamskipan Føroya KSF og Føroya Kommunufelag FKF hava havt sín á millum fund í Vági fríggjadagin 5. juli 2002 um felags kommunal viðurskifti.

KSF var umboðað av Jógvan Krosslá, stýrisformanni, Jens M. Poulsen, starvsbólkaformanni og Kára Thorsteinsson, skrivara.

FKF var umboðað av Jacob Vestergaard, formanni og Sveiney Sverrisdóttir, skrivara.

Tosað varð um ymisk kommunal viðurskifti við tí fyri eyga at samstarva um hesi og onnur felags viðurskifti. Endamálið var eisini at finna fram til, hvussu langt eitt samstarv kann náast við tí fyri eyga at kunna leggja feløgini saman í eitt kommunufelag.

Feløgini vóru samd um, at ymsar forðingar vóru fyri beinleiðis samanlegging av feløgunum, tí sennnið í fólkatalinum í kommununum er stórt og viðing fyri hesi staðroynd haltar, men at tað ber til at arbeiða fram ímóti einum felag við samstarvi á so mongum økjum, sum gjørligt.

Á fundinum viðgjørdi feløgini eisini spurningin um kommunurnar skulu deila uppgávur við landið, um uppgávur, sum landið kann leggja út til kommunurnar at umsita og hava ábyrgd av, um hvat skal til fyri at kunna yvirtaka kommunalar uppgávur, sum landið fyrisitur og eisini varð tosað um íløgukarmar hjá kommununum.

Formenninir eru samdir í, at feløgini í nógv størri mun eiga at tosa saman um felags áhugamál og miða fram móti at samansjóða sjónarmiðini hjá feløgunum, áðrenn farið verður undir samráðingar við aðrar partar m.a. við landsmyndugleikarnar.

Feløgini eru samd um at hittast aftur í heyst at arbeiða víðari við ætlanini um samstarv á so mongum økjum sum gjørligt til gagns fyri allar kommununar.

Kommunusamskipan Føroya - Føroya Kommunufelag

Jógvan Krosslá, formaður
Jacob Vestergaard, formaður